# Zlatko blakar øll út



**Kendi danski sjónleikarin, Zlatko Buric, verður leygarkvøldið gestabarrvørur á Platform í Havn. Showið hjá honum kallast »Ud af mit diskotek«**

Zlatko Buric telist millum kendastu donsku sjónleikararnar í dag. Hann er tilflytari til Danmarkar og spælir til fulnar sínar leiklutir, sum oftast eru í nánd av hansara egnu støðu sum tilflytari til Danmarkar.

Zlatko hevur havt týðandi leiklutir í filmum sum Pusher og Bleeder, hann spældi við í Taxa, og hann er eisini kendur frá lýsingum hjá Tuborg: »Ud af min kiosk«.

Leygarkvøldið 13. september verður Zlatko at finna á Platform í Havn.

# Heri og Elin standa fyri karoke-kapping



**Leygarkvøldið 13. september verður karoke-kapping í Badmintonhøllini í Havn. Tveir av reportarunum úr Barometrinum fara at stíla fyri kappingini, har vinningurin er ein flogferðaseðil**

Tey flestu munnu kenna til at syngja karoke, og torir tú at halda teg fram at, so er møguleiki at vinna ein flogferðaseðil frá Maersk um vikuskiftið.

Dansur verður í Badmintonhøllini, og ein partur av kvøldinum verður nýttur til eina karoke-kapping. Heri Jacobsen og Elin í Stórustovu fara at standa fyri kappingini.

Bussar koyra úr Vágum, Vestmanna og Eysturoynni í sambandi við tiltakið, sum byrjar kl. 23.30 leygarkvøldið.

# Guðrun misti fýra pláss

**Hesa vikuna er Guðrun Sólja Jacobsen dottin fýra pláss niður á almenna hitlistanum fyri fløguútgávur, men hon kann fegnast um, at hon nú er komin inn á Tjeklistan hjá Danmarks Radio**

Guðrun S. Jacobsen hevur nú verið tríggjar vikur á danska hitlistanum fyri fløguútgávur, men hesa vikun er hon farin fýra pláss aftur.

Guðrun kom beinleiðis inn sum nummar 2 á listanum, og spenningur var um, hvørt hon kundi enda ovast á listanum. Men eftir tvær vikur sum nummar 2 er hon nú nummar 6 á listanum. Tað er framvegis Big Fat Snake, sum liggur ovast.

Guðrun er nú komin inn á Tjeklistan hjá Danmarks Radio P3, sum er kendasti danski hitlistin fyri sangir. Her kom Guðrun leygardagin inn sum nummar 18 við sanginum You're Mine.



*Guðrun Sólja misti á fløguhitlistanum, men kom inn á Tjeklistan um vikuskiftið*

# Trý nýggj løg frá Messell

**Føroyski tónleikarin, sum er búsitandi í Danmark, hevur lagt trý nýggj løg á heimasíðuna hjá sær. Øll, sum hava atgongd til internetið, kunnu taka sangirnar niður ókeypis**



Nýggju sangirnir frá Messell eru Missing You, Sing and Play Guitar og Wasted Time.

Terji Messell hevur spælt sangirnar inn saman við sínum føstu tónleikarum. Teir eru Kristian Djernes (Trummur og Martin Pedersen (bass)

Heimasíðan er at finna á adressuni: www.terjimessell.dk

# Jens Marni og Jákup við í »Stjørna í eitt kvøld«

**Tað verða tveir føroyingar við í sangkappingini Stjerne for en aften. Jens Marni Hansen og Jákup Lind Dam, sum er púra ókendur sum sangari, skulu royna seg í kappingini, sum føroyingur vann seinast**

Dagur og Vika visti mánakvøldið at siga, at umframt Jens Marna Hansen, skal eisini ein annar føroyingur verða við í sangkappingini »Stjørna í eitt kvøld«. Tað er Jákup Lind Dam, sum fyri kortum flutti til Danmarkar at búgva.

Hann segði við Sjónvarpið, at vinfólk og familja høvdu eggjað honum til at royna seg í kappingini, og sigurin hjá Guðrun S. Jacobsen hevði eisini skundað undir avgerðina.

Jens Marni og Jákup skulu báðir verða við í sama umfari, og tað verður 10. oktober.



# Nú verður vatnmálið loyst

**Formansskapurin í Miðvágs Kommunu hevur á fundi við Føroya Fiskavirking lagt fram ein ætlan, sum endaliga fer at loysa trupulleikan við vatninum hjá kommununi**



*Steindeytt er framman fyri virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági. Vatnið er nú reint aftur, og tað er upp til leiðsluna í Føroya Fiskavirking, nær byrjað verður at arbeiða aftur*

*Mynd: Edvard Joensen*

VATNMÁLIÐ

*Edvard Joensen*

**Miðvági:**
Miðvágs Kommuna tekur nú stig til at loysa vatntrupulleikan, sum verið hevur, endaliga. Í framtíðini fer als ikki at verða tikið vatn aðrastaðni enn úr Leitisvatni.

Varaborgarstjórin í Miðvágs Kommunu, Johannes Ellefsen, sigur, at formanskapurin í Miðvágs Kommunu var á fundi við leiðsluna í Føroya Fiskavirking týsdagin.

Á tí fundinum varð greitt frá, at Miðvágs Kommuna í framtíðini ikki fer at taka vatn aðrastaðni enn úr Leitisvatni. Tað vil siga, at tað kemur ikki upp á tal at taka úr áunum, sum onkuntíð hevur verið gjørt, og sum hesin seinasti trupulleikin stóðst av.

Fyri at tryggja sær fult og heilt, at einki óruddфylgir við inntakinum úr Vatninum, fer kommunan at leingja leiðingina einar átta metrar longur út í vatnið, sigur Johannes Ellefsen. Kannað er eftir, hvussu botnviðurskiftini eru, og tað sær gott út, sigur hann.

Sostatt verður altíð pumpað úr Vatninum niðan í brunnarnar. Tað verður nakað dýrari í orkunýtslu, men er eftir øllum at døma neyðugt.

Johannes Elelfsen sigur, at hendan loysnin er ikki formliga góðkend av bygdarráðnum í Miðvági enn, men væntandi er ikki, at nakar fer at vera í móti tí, heldur hann.

Stóru trupulleikarnir, sum verið hava, stóðust av, at vatnleiðingin úr Vatninum niðan í brunnarnar var brotin, og tí var neyðugt at taka vatn aðrastaðni.

Heilt greiðar mannagongdar fyri, hvussu farast skal fram, eru gjørdar, og tað skal so eisini vera við til at tryggja, at slíkt ongantíð hendir aftur, sigur hann.

Seinastu vatnroyndirnar, sum tiknar eru í Miðvági, vísa, at nú er vatnið heilt reint, og ongar bakteriur eru í vatninum meira.

Enn er einki arbeiði byrjað aftur á flakavirkinum, og tað verður so upp til Føroya Fiskavirking at gera av, nær tað verður.

# Maersk Air fær nýggjan stjóra

**Danska flogfelagið Maersk Air skal skifta stjóra. Á nýggjárinum tekur stórin í Air Greenland, Finn Øelund, við sum stjóri í Maersk Air**

FLOGFERÐSLA

*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Danska flogfelagið Maersk Air fer at skifta stjóra á nýggjárinum. Flemming Ipsen, sum hevur verið stjóri seinastu tíðina, fer í annað starv, og nýggjur stjóri verður Finn Øelund, sum í dag er stjóri í Grønlendska flogfelagnum, Air Greenland.

Per Brinch, sum er kunningarleiðari hjá Maersk Air, sigur, at talan er um fyrireikað stjóraskifti í felagnum.

Nakað herfyri løgdu nevndarformaðurin, Bjarne Hansen, og stjórin, Ole Dietz, frá sær og eru farnir úr felagnum. Tá varð nýggj leiðsla sett, og skuldi hon so finna fram til eina varandi loysn.

Nýggi nevndarformaðurin, Troels Dilling, fekk til uppgávu at finna ein stjóra, sum hevði tilknýti og kunnleika til flogferðslu. Hann metir felagið seg hava funnið, nú stjórin í Air Greenland tekur við á nýggjárinum, sigur Per Brinch.

Flemming Ipsen, sum hevur verið stjóri í Maersk Air hesa tíðina, síðan leiðsluskiftið, hevur bara verið ein fyribilsloysn, soleiðis sum ætlað var frá byrjan. Hann fer nú í annað starv á høvuðsskrivstovuni hjá A.P. Møller fyritøkuni. Hann verður eisini nevndarlimur í Maersk Air.



